Føroyskur stílur

<u>Hesar røkjuskapsreglur skulu fylgjast:</u>

- **Millum reglurnar: 1,5**
- **Breddar: Vinstri og høgri breddi skulu vera beinir**
- **Skriftstødd: 12**
- **Skrift: Times New Roman**
- **Yvirskrift**
- **Skrivað hevur**
- **Dagfesting**
- **Skúli**
- **Lærari**
- **Stílurin skal skrivast á Microsoft Word ella Openoffice**

<u>GG!</u>

Hesin stílur skal latast inn í seinasta lagi 28. februar 2013.

Hjartaligan skrivihug☺

Góða framtíð

Uppgávuorðing:

Skriva eitt realistiskt bræv til barn títt, sum júst er føtt tann 24. august, á Bartalsmessu, í 2030.

Stílurin skal eita: **Góða barn**

Veitst tú, hvør ið sær teg?

VIÐHVØRT ER SKÚLIN ORDILIGA ROTIN. Tí kann tað vera freistandi bara at goyma seg aftan fyri telduna og gera okkurt stuttligari. Men sjálvt um tú situr í einum króki uttan forvitnar áskoðarar, kunnu mong síggja, hvat ið tú tekst við.

At surfa og kjatta verður mett sum privat, og tí ynskja tey flestu helst ikki at verða órógvað. Best er at sita heima við afturlatnari hurð, ja, kanska læstari hurð. Og tað er lætt at gloyma, at á internetinum stendur hurðin ofta heilt opin.

LÆTT AT KANNA
Allar teldur hava eina IP-adressu. Hetta er fyri at telduposturin, sum tú sendur, skal koma til rætta móttakaran, og fyri at heimasíðurnar, sum tú vitjar, skulu kunna sendast til júst tína teldu. Fyri at hackarar og telduvirus ikki skulu kunna bróta inn í telduna, hava flestu skúlar ein brandmúr (Firewall). Í brandmúrinum sæst, hvørjar IP-adressur ymsu teldurnar hava, hvørjar heimasíður teldurnar hava verið á; hvussu ofta og hvussu leingi.
Allar heimasíður, tú fert inn á, verða eisini goymdar inni á telduni, sum tú situr við. Tað verða tær, so tað er skjótari at fara inn á tær aftur seinni. Tú kanst strika hesa skráseting á telduni. Men velur tú ikki at gera tað, er lætt hjá øðrum at síggja, hvørjar heimasíður tú vitjar.
Óviðkomandi kunnu eisini finna útav, hvørjum tú hevur sent teldupost og hvørjum tú hevur fingið teldupost frá. Um vinir - eisini teir minni góðu - fáa fatur á tínum loyniorði, fáa teir atgongd til alt, sum annars bara var ætlað tær. Fyri teg kann hetta verða óheppið og fáa álvarsligar fylgjur.

ÁBYRGD OG REGLUR
Onkuntíð bilar tað kanska onki, at onnur síggja, hvat ið tú gert. Men tað kunnu vera løtur, har tú ikki vilt at onnur vita, hvat ið tú tekst við. Tí eru reglur fyri, hvussu stórt eftirlit skúlin kann hava við teldunum. Eisini eigur skúlin at hava reglur fyri, hvat næmingar og lærarar kunnu brúka teldurnar til. Men tú mást ikki gloyma, at tú sjálv/ur hevur ábyrgdina av tínum gerðum. Altíð.
Tá ið tú ert á internetinum, er ikki lætt hjá tær at vita, um onnur hava eyguni við tær. Tú ímyndar tær, at har eru bara tú og teldan, og at ongin kennir teg. Sannleikin er ein annar... Ongin er anonymur á internetinum.

HVAT HELDUR TÚ?

Hvør skal kunna síggja upplýsingarnar í telduni, sum tú brúkar í skúlanum? Lærarar? Floksvinir? Foreldur? Hvussu nógv skulu tey hava loyvi at síggja, og hvat skulu tey kunna brúka upplýsingarnar til? Hevur lærarin heimild at kanna teldurnar, um skúlin fær frænir av, at skúlans teldur verða nýttar til happing?

SUM EIN OPIN DAGBÓK
Tað er gjørligt hjá øðrum at síggja, hvørjar heimasíður tú hevur vitjað. Strikar tú ikki sporini eftir teg í telduni, kunnu onnur sneyta í teimum.
Vandin fyri, at onnur royna at sneyta í upplýsingum, sum tú hevur lagt eftir teg, er nokk størstur á skúlanum, bóka- savninum ella á internetcaféum.

HVUSSU KUNNU TEY KENNA MEG?
Hvørja ferð tú fert á internetið, fært tú eina IP-adressu. Tín internetveitari skrásetur tína IP-adressu og eisini hvørjar IP-adressur, tú vitjar. Tá løgreglan hevur brúk fyri upplýsingum um internet- vitjanir, kann hon kanna loggin og síðani biðja internetveitaran um eitt yvirlit yvir, hvør brúkti IP-adressurnar tær ávísu tíðirnar.
Tey, ið eiga heimasíðurnar, vilja oftani kenna gestir sínar og tí goyma tey eina lítla fílu (cookie) í tínari teldu. Hvørja ferð tú vitjar eina heimasíðu verður kannað, um tín telda hevur eina slíka fílu. Upplýsingar verða skrásettar í fíluni, til dømis brúkaranavnið og loyniorðið, tú brúkar fyri at logga teg á heimasíðuna. Tú kanst stilla telduna soleiðis inn, at hon ikki kann goyma slíkar fílur. Tá er tó vandi fyri, at nógvar heimasíður ikki vilja loyva tær inn. Men tað ert tú sum gert av, hvat hevur størst týdning: persónsvernd ella atgongd.

HVAT HEVUR SKÚLIN LOYVI AT KANNA?
Meginreglan er at skúlin hevur ikki loyvi at nýta loggin í telduskipanini til eftirlit av internetnýtsluni hjá næmingunum. Endamálið við logginum er at tryggja, at telduskipanin verður brúkt við skili. Loggurin kann kortini nýtast til at avdúka óhóskandi virksemi á internetinum. Í slíkum førum kann skúlin brúka upplýsingarnar í logginum til at ávara um, at heldur ósømiliga internetnýtslan fram, fer skúlin í loggin at kanna hvør hevur ábyrgdina av hesum.
Skúlin eigur at hava greiðar reglur fyri, hvussu teldurnar skulu nýtast. Møguligt internet eftirlit skal vera í tráð við persónsupplýsingarlógina og reglurnar á skúlanum.

(Kelda, Dátueftirlitið)

Leinki:

Upplýsingarfilmar um trygd á netinum, sum skulu brúkast til at skriva stílin.

http://www.dat.fo/00005/00023/

Uppgávuorðing:

Viðger greinina og upplýsingarfilmarnar omanfyri og ger viðmerkingar til hesi bæði.

Hvussu ferðast tú tryggast á netinum?

Stílurin skal eita: **Veitst tú, hvør ið sær teg?**



Lívsmynd

Orð og lag: Steintór Rasmussen.

Enn eri eg ungur
og enn í góðum lag,
mær tørvar einki føðibræv
til at prógva tað.

Eg minnist ei mín barnadóp
og mína grulvutíð;
nú eri eg nóg vaksin
til at skilja hvat og hví.

Eg vil elska, eg vil syngja,
eg vil fevna kærleikan,
eg vil leita til tey stød,
har eg finni sanleikan.

Lívið er mítt listarverk,
eg máli jú hvønn dag;
um eg fylli hundrað ár,
ei liðugt verður tað.

Vónin er at myndin mín
ein mildan skugga fær,
tá fólk úr øllum heiminum
frælsið ogna sær.

Eg vil elska, eg vil liva,
eg vil syngja friðarlag
saman við so mongum menniskjum,
sum altíð vilja tað.....

Vilja gráta, vilja flenna,

ynskja frið í heiminum,
og við álit' á hvønn annan
læra mangt av lívinum.

Tú kanst lurta eftir sanginum her:
http://www.youtube.com/watch?v=b6tHvYk490I

http://www.youtube.com/watch?v=3Lc0O_8HPn8

Uppgávuorðing:
Greina og tulka sangin.

Yvirskriftin til stílin er: **Lívsmynd**

Gløgt er gestsins eyga

Í miðjum Atlantshavinum liggja Føroyar sum 18 grønir dropar, spjaddir í havinum. Avbyrgdir frá umheiminum liva knappir 50.000 føroyingar eitt lív tætt upp at náttúru og átrúnaði, siðvenju og ætt. Men Føroyar eru meir enn tað.

Undir skorpuni er eitt ættarlið av ungum, ið vaksa upp við gomlum siðvenjum, men har er eisini ein nýggjur, altjóðargjørdur veruleiki farin at seta týðilig spor. Har ber til at tendra teldu sína og lata allan heimin fløða móti sær ella keypa altjóða bløð í nærmastu kioskini. Har ið ein ungur sjómaður droymir um at gerast yrkjari í einum samfelagi, har 95% av útflutninginum er fiskur.

Tung skýggj hanga handan tey rustlittu fjøllini. Tí at hvat ger eit gamalt samfelag, tá ið tey ungu stinga av og koma ikki aftur? Á heysti í 2012 fór eg til Føroya at finna fram til, hvussu tað er at vera ungur á einum plássi, sum er so langt burturi, og tó so tætt hjá.

næstan
ALTÍÐ OPIÐ!
LOTTO
MILKSHAKE
SOFTICE
MIX-IT
Skundverður
-altið friskt

FØROYAR

NORTHERN SOUL
FUSION CRAFT

IRON MAIDEN

ALBER ALBER
ACAB
GOD IS GAY
YO!

JESUS
LIVIR
EINVEGIS



Hetta er myndarød, sum danin, Daniel Hjort, hevur tikið í Føroyum. Daniel Hjort gongur á danska journalisthásskúlanum í Århus, har hann lærir til journalistafotograf. Myndarøðin hevur staðið í danska dagblaðnum, Information. Daniel Hjort kallar myndarøðina fyri *So far but yet so close.*

Upplýsingar um Daniel Hjort eru at finna á heimasíðu hansara:

http://www.danielhjorth.dk/

Uppgávuorðingar:

Gamalt føroyskt orðatak sigur, at: "Gløgt er gestsins eyga". Hvat vil tað siga?

Hvat sigur myndarøðin eftir Daniel Hjort um okkum?

Ert tú samdur við Daniel Hjort? Grundgev væl og virðiliga fyri meiningum tínum.